e-mail: jakup@sosialurin.fo

# Ítróttur

Sosialurin - Box 76 - 110 Tórshavn - Tlf. 31 18 20 - Fax 31 47 20



## Rógvi gó›a byrjan upp á súkkluári›

*Súkkling: Um vikuskifti var vágbingurin Rógvi Johansen vi› í fyrstu súkklukappingini hjá teimum í ár. Rógvi gjørdist nummar tr‡ í A-bólkinum, og ta› er hann stak væl nøgdur vi›*

TERJI NIELSEN

Um ársskifti› frættist, at kanska besti føroyski súkklarin, vágbingurin Rógvi Johansen, fór at skifta felag. Rógvi súkklar nú fyri felagi› Cycling Aarhus Elite, og leygardagin vóru Rógvi og n‡ggju li›felagar hansara vi› í fyrstu kappingini í hesum súkkluárinum. Kappingin fór fram í Hammel nærheindis Århus.

**Væl nøgdur vi› úrsliti›**

Rógvi og og teir fimm li›felagarnar hjá honum súkkla allir í A-bólkinum, og tá i› allir súkklararnir komu á mál, var vágbingurin tann tri›ji, i› fór um málstrikuna.

Hetta úrsliti› er Rógvi væl nøgdur vi›, tí ein kapping so tí›liga í súkkluárinum gevur altí› gó›ar ábendingar um, hvussu vetrarvenjingin hevur veri›. Rógvi sigur, at beinini ikki vóru so væl fyri, sum tey kundu veri›, tí at hann hevur veri› til ymiskar testir seinastu tí›ina, og tí eru beinini eitt sindur tung í løtuni.

Um sjálva kappingina leygardagin sigur Rógvi, at hon fór fram vi› tann millum súkklarar væl kenda Pøt-mølle bakkan í Hammel. Starturin var vi› fótin av bakkanum, og sí›ani skuldi bakkin súkklast seks fer›ir, á›renn komi› var á mál ovast á bakkanum.

Eftir gó›u byrjanina hjá Rógva upp á súkkluári› kann ikki sigast anna›, enn at ta› ver›ur spennandi at fylgja vi› í, hvussu gangast fer hjá honum seinni í ár.



## Rennibreyt um Tórsvøll

*- alment bræv til b‡rá›slimirnar í Tórshavnar B‡rá›*

Fjølmi›larnir bóru okkum bo› um; “at mentunarnevndin í Tórshavnar B‡rá› fer at lata B‡rá›num eitt uppskot til samtyktar, har nevndin mælir B‡rá›num frá at gera eina rennibreyt um Tórsvøll.”

Í okkara oyrum eru hetta skakandi tí›indi, i› eru okkum til miklan tregu. Og vilja vit tí heita á limirnar í Tórshavnar B‡rá›, um at bera so í bandi, at hetta uppskoti› ver›ur mana› aftur í jør›ina.

Ítróttarsambandi› fyri breka› er eitt serligt sambband. Vit umbo›a menniskju, i› ikki fáa heimvist í ø›rum sersambondum. Hesi menniskju hava ein serligan tørv, og skal hesin tørvurin ver›a nøkta›ur, so mugu hesi fáa serligar umstø›ur at virka undir.

ÍSB hevur frælsan ítrótt á skránni tvær reisir um vikuna. Tann frælsa ítróttin er sera væl egna› til menniskju, i› hava brek. Og tí kunnu vit siga, at ein rennibreyt hev›i veri› gull verd í okkara arbei›i. Her hugsa vit bæ›i um dagliga venjing, heimligar kappingar og altjó›a kappingar.

Vit eru sostatt millum tey mongu, i› ynskja, at høvu›ssta›urin fær sína egnu rennibreyt. Men tá i› ta› er sagt, so vilja vit í sama andadrátti strika undir, at sta›urin, har breytin ver›ur løgd, er eins t‡dningarmikil og breytin sjálv. Leggur tú eina breyt í ongamannalandi, so kanst tú greina hetta or›i› og siga; at breytin sær ongan mann. Og tá er lítil› vunni›!

Svangaskar› er kanska besta dømi um, at so er! Gundadalur er harafturímóti ítróttadepilin í høvu›ssta›num. Ta› er í Gundadali at ítróttafólk og ásko›arar, børn og vaksin fylkjast gerandis sum heilagt.

Spola vit filmin nógv ár aftur í tí›ina, so kunnu vit siga, at ta› vóru hugsjónarmenn, i› skaptu Gundadal. Og loyva vit okkum at kaga inn í hugan hjá hesum monnum, so síggja vit, at rennibreytin var á tekniborðinum frá fyrsta degi; breytin skuldi varpa ljós á ta› fullgjørda verki›. Og vi› vir›ing bæ›i fyri forfedrum og fortí›ini, nútí›ini og framtí›ini halda vit, at ta› skuldi veri› sjálvsagt, at rennibreytin ver›ur løgd í Gundadali. Tí sært tú, at leggur tú eina rennibreyt um Tórsvøll, so hevur tú bæ›i umstø›ur og umhvørvi. Og tá i› tú samantvinnar hesi hugtøkini,; gó›ar umstø›ur í rætta umhvørvinum, so hevur tú sáa› í ta gó›u jør›ina, sum ber ávøkst.

Onkur vil ver›a vi›, at Tórshavnar B‡rá› hevur ikki rá› at gera eina rennibreyt um Tórsvøll. ÍSB heldur harafturímóti, at B‡rá›i› hevur ikki rá› at lata vera. Her hugsa vit bæ›i um ítrótt, b‡armentan og byggilist.

Kæri b‡rá›slimur, minst til, at ta› er ov seint at ver›a eftirsnarin!

**ÍSB**

## Favorittarnir vi› undirlutan

*Tvær av teimum f‡ra fjór›ingsfinalunum í Champions League vóru leiktar t‡skvøldi›.*

HEINI Í SKORINI

Real Madrid tók ímóti Manchester United á einum fullsettum Santiago Bernebau t‡skvøldi›. Hóast hetta eru tvey av sterkastu li›um í Europa, eru mong á einum máli› um, at Manchester United eru favorittur til at koma ví›ari til semifinalurnar. United hevur spælt betri og meiri sannførandi seinastu tí›ina, so ikki er skeivt at siga, at enska europameistararnir eru favorittar. Men Real Madrid spældi sera væl t‡skvøldi›. Teir byrja›u nógv betri enn United, og teir vóru eisini nógv betra li›i› í fyrra hálvleiki. Teir høvdu fleiri sera vandamiklar møguleikar, men Mark Bosnich í United málinum spældi framúr væl. Vandamikli áleyparin hjá spaniólunum, Raul, gav United verjuni stórar trupulleikar vi› sínum vandamikla vinstra beini›, og argentinarin Fernando Redondo spældi í heimsklassa á mi›juni hjá Real, men dagsins ma›ur var heilt víst fyrrverandi Liverpool leikarin Steve Mcmanaman, sum spældi ein frálíkan dyst úti á høgra vongi. Sum sagt var Real Madrid betri allan fyrra hálvleik, og teir høvdu fleiri møguleikar at leggja seg framum, men hvørjafer› var tann nógv útskeldna›i United málverjin Mark Bosnich á rætta sta›num. Andy Cole hev›i nakrar royndir á Real Madrid máli›, og Dwight Yorke fekk enntá bóltin í máli› hjá Real Madrid í endanum av fyrra hálvleiki, eftir eitt hart skot frá Paul Scholes, men Yorke var dømdur rangstaddur, og sostatt var hálvleikssto›an 0-0.

United spældi betri í byrjanini av seinna hálvleiki, enn teir gjørdu í fyrra, men Real Madrid, vi› Steve McManaman á odda, var enn vandamiklara li›i›. Besta møguleikan í dystinum fekk júst Mcmanaman, tá hann gjørdist púra leysur vi› Mark Bosnich, men skoti› var ov vánaligt, og Bosnich fekk bjarga› vi› beininum. Sí›ani sat Real Madrid á dystinum, hóast bæ›i Cole og Scholes høvdu naskar royndir. Tann innskifti Elvir Baljic hev›i eisini ein stóran møguleika at avgera dystin til fyrimuns fyri Real Madrid, men dysturin enda›i 0-0, og United kann takka málverja sínum Mark Bosnich fyri eitt megnaravrik.

United venjarin Sir Alex Ferguson seg›i solei›is eftir dystin:

-Ein málleysur javnleikur er ikki eitt gott úrslit fyri okkum. Ta› liggur eitt stórt arbei›i hjá okkum fyri framman. Spæli›, sum vit vístu í fyrra hálvleiki, var sera vánaligt, og skulu vit hava nakrar vónir um at koma ví›ari, mugu vit spæla betri í seinna dystinum á Old Trafford.

So avgerin fellur á Old Trafford í Manchester 18. apríl, tá hesi bæ›i li›ini bresta saman aftur í seinna dystinum.

**Porto gav Bayern ein hvøkk**

Hin dysturin sum var leiktur t‡skvøldi›, var dysturin millum Porto og Bayern Munchen, og var ta› á heimavøllinum hjá Porto. Mong halda Bayern vera størfavorittar, men t‡skvøldi› var Porto betra li›i›. Bayern Munchen javna›i til 1-1, tá bert 10. min. vóru eftir, og máli› kom eftir eitt fríspark. Stefan Effenberg spældi brasiliumannin Paulo Sergio púra leysan inni í Porto brotsteiginum, og Sergio sveik ikki, men setti bóltin trygt í neti›. Úrsliti› var sera skuffandi fyri Porto, sum hev›i yvirvág í spælinum og betri møguleikar ígjøgnum allan dystin. Porto fekk sítt mál í 47. min, og var hetta aftur vandamikli áleyparin Mario Jardel, sum eftir eitt inlegg frá jugsoslavanum Ljubimko Drulovic, kundi skalla bóltin í neti›. Sami leikari kundi havt økt um lei›sluna í 77. minutti, men t‡ski landsli›smálverjin Oliver Kahn bjarga›i meistarliga. Ísta›in javna›i sum sagt Bayern Munchen, men Porto var betra li›i›, og kundi væl havt avgjørt dystin til egnan fyrimun. Seinni dystur teirra millum ver›ur sama dag, sum Manchester United og Real Madrid spæla, 18. apríl. Tá tekur Bayern ímóti Porto á Olympiastadion í T‡sklandi. Vi› einum útimáli› hevur Bayern betri møguleikar at koma ví›ari, tí Porto skal undir øllum umstø›um hava eitt mál. Men hevur brasilski Porto áleyparin Mario Jardel ein gó›an dag, kann alt henda.

# Gallakvøldi› hjá hondbóltinum nærkast

*Hondbóltur: Nú hondbóltskappingarári› er fari› aftur um bak, skulu ársins leikarar, venjarar og anna› veljast. Hetta ver›ur gjørt á stórum hondbóltsgallakvøldi, sum ver›ur nú leygarkvøldi›*

TERJI NIELSEN

Væleydna›a tiltaki› í fjør, tá i› hondbóltsleikarar úr øllum landinum hittust eftir loki› kappingarár til eitt stórfingi› gallakvøld, ver›ur endurt‡ki› nú leygarkvøldi›. Á gallakvøldinum ver›ur funni› fram til, hvørjir leikarar hjá bæ›i monnum og kvinnum ver›a sk‡rdir ársins leikari, verjuspælari, áloypari og so framvegis.

**Leikararnir hava atkvøtt**

Øll 1. deildarli›ini hava longu atkvøtt um, hvønn tey halda vera rætta vinnaran av teimum ymsu hei›urslønunum, og vit her á Ítróttar Sosialinum loyva okkum her at gita, hvør i› fer at vinna tær ymsu hei›urslønirnar.

Ta› eru neyvan nøkur loyna, at ta› allarhelst ver›ur annar av teimum bá›um stórskjúttunum hjá Neistanum, Áki Olsen og Heini Joensen, sum ver›ur valdur til ársins spælara. Vit loyva okkum at gita, at ta› ver›ur Heini, sum fer avsta› vi› sigrinum. Hjá kvinnunum kann roknast vi›, at ta› ver›ur onkur av útlendsku spælarunum, sum fer avsta› vi› hei›urinum. Um ta› ver›ur Ioana Rapa, Vesna Tomajek ella onkur onnur er ilt at meta um, men vit gita, at ta› ver›ur Ioana. Ta› ver›a eisini júst tey bæ›i, Heini Joensen og Ioana Rapa, sum eisini fara avsta› vi› steypunum fyri at gerast ársins toppskjúttar.

Ársins málverji ver›ur trupul at finna, serliga hjá monnunum. Kappingin stendur helst ímillum Bár› Nielsen úr VÍF og Johan Danielsen úr StÍF. Kanska kann íslendingurin Petur Magnusson gera seg galdandi, eftir hansara branddyst í Neistamálinum leygardagin. Vit rokna vi›, at ta› ver›ur Bár›ur, sum fer avsta› vi› steypinum. Hjá kvinnunum stendur kappingin óiva› millum tær bá›ar Maritu Hermanssen úr Kyndli og Rannvá Andreassen úr Stjørnuni. Kanska hevur Marita munin, og vit rokna tí vi›, at hon dregur ta› longra strái›.

Hvør fer avsta› vi› hei›rinum sum Ársins Komandi Stjørna hjá monnunum man lítil ivi ver›a um. Eftir avrikini hjá unga neistaleikaranum Áka Mørk í teimum seinastu og avgerandi dystunum, er hann heilt grei›ur favorittur til hendan hei›ur. Hjá kvinnunum hava vit Guri› Mortensen úr VB sum favoritt til at vinna hendan hei›ur.

Hinvegin er nógv truplari at spáa um, hvør i› ver›ur valdur til ársins verjuleikara, bæ›i hjá kvinnum og monnum. Millum menninar fer kappingin kanska at standa ímillum Sjúr› Holm úr VÍF, Hans Áka Dahl-Christiansen úr Kyndli og Sveinbjørn Poulsen úr StÍF. Hvør fer avsta› vi› steypinum, er ilt at meta um, men kanska ver›ur ta› Sjúr›ur. Hjá kvinnunum stendur kappingin eisini ímillum fleiri spælarar. Li›skiparin hjá Kyndli, Jórun Ludvig, er eitt gott bo›, eins og systrarnar Sólrun og Ey›britt Krosslá úr VB, men favorittur hjá okkum til at vinna hendan hei›ur er Ioana Rapa úr VÍF.

Ársins áleypari skal eisini veljast, og har er kappingin óiva› hør› millum teir bá›ar stórskjúttarnar hjá Neistanum, Áka og Heina, sum tó eisini fara at fáa kapping frá eitt nú Sámal Joensen úr VÍF og ikki minst John Petersen úr StÍF, sum skeyt eina rúgvu av málum, so skjótt sum hann var leysur av fótbóltinum. Vit rokna tó vi›, at ta› ver›ur annar av neistamonnunum, sum fer avsta› vi› sigrinum. Hjá kvinnunum man Ioana Rapa eisini fara at gera seg galdandi her, men Simona Hansen úr Stjørnuni fer óiva› at geva henni har›a kapping, og kanska fer unga klaksvíksgentan avsta› vi› sigrinum.

Í fjør gjørdust teir bá›ir Hans Thomassen og Hanus Kúrberg ársins dómarapar, men í ár rokna vit vi›, at teir fara at fáa har›a kapping innan úr Runavíkini, frá Dánjali og Kára Hansen, i› vit rokna vi› fara at vinna henda hei›ur.

At ta› eru venjararnir hjá føroyameistarunum, i› eru mest upplagdir til at velja til ársins venjarar, man lítil ivi ver›a um. Tískil rokna vit eisini vi›, at ársins venjarar 2000 fara at eita Páll Poulsen hjá monnunum og Vesna Tomajek hjá kvinnunum.

**Hvat vi› eini serligari hei›ursløn**

Tá i› man situr solei›is og skal meta um eitt fari› kappingarár og hei›urslønir, er ta› ikki frítt, at man fer at hugsa um Oscar hei›urslønirnar innan filmsheimin. Hesar vóru í sjónvarpinum nú leygarkvøldi›, og tá i› tær eru á skránni, ver›ur mangan ein serligur Oscar latin onkrum, sum hevur tænt filmsheiminum væl í mong ár. Hetta kundi passandi eisini veri› gjørt í ár, tí at ein ma›ur sum Kári Mortensen hevur tænt føroyskum hondbólti væl í so mong harrans ár, og nú gjørdist hann føroyameistari í 1. deild sum 45 ára gamal! Hann átti kanska at fingi› eina serliga hei›ursløn.

Gallakvøldi› hjá hondbóltinum ver›ur í Lærarask úlahøllini nú leygarkvøldi›.



*Ioana Rapa er millum favorittarnar til at gerast ársins hondbóltsleikari hjá kvinnunum*



*Kanska átti Kári Mortensen at fingi› eina serliga hei›ursløn, nú hann sum 45 ára gamal, enn einafer› er blivin føroyameistari*

## ÍSB-fundur vi› heimsmeistarum

Í kvøld frá klokkan sjey til átta hevur ÍSB fund í skúlanum á Argjum. ÍSB hevur bo›i› tveimum donskum svimjarum, heimsmeistaranum Peter Lund Andersen og hei›ursmerkjavinnaranum frá paralympisku leikunum í Atlanta, Martin Jacobsen, higar, og teir fara at ver›a vi› á fundinum í kvøld. Endamáli› vi› fundinum er at fáa teir at vísa á, hvussu nógv svimjarar á altjó›a stø›i venja, og hvussu langt ber til at koma, hóast brek. Teir fara á fundinum at grei›a frá, hvussu teir eru komnir so langt, og hvat teir ætla sær ví›ari, umframt mangt anna›. Høvi ver›ur hjá fundarfólkinum at seta spurningar, og eftir fundin ver›ur møguleiki fyri at síggja teir bá›ar royna seg í svimjihylinum á Argjum.